Alment útboð

Ráðgevingartænastur við støði í Karlstad-leistinum til Sernámsdeildina í Undirvísingarstýrinum

1. Útbjóðari

Undirvísingarstýrið
Sernámsdeildin

---

2. Endamál

Endamálið við útboðnum er at tryggja børnum, ungum og teirra avvarandi atgongd til høgt serkøna ráðgeving innan Karlstad leistin.

Ráðgevingin skal stuðla undir menning av einum inkluderandi skúla- og dagstovnaøki, har børn og ung við serligum tørvi fáa bestu møguleikar fyri menning, læring, luttøku og trivnað.

---

3. Uppgávan

Veitarin skal veita:

- Fakliga ráðgeving og vegleiðing innan Karlstad leistin til børn, ung og teirra avvarandi og starvsfólk í skúla- og dagstovnaøkinum
- Samstarva við sernámsdeildina um visitering og skráseting

Uppgávurnar verða loystar bæði talgilt og við vitjanum.

4. Barnarættindi

Undirvísingarstýrið leggur dent á, at øll ráðgeving undir hesum sáttmála verður grundað á virðing fyri rættindum hjá børnum og ungum.

Veitarin skal arbeiða út frá einum barnarættindagrundaðum sjónarhorni og í sínum arbeiði:

- hava barnsins besta sum grundleggjandi atlit,
- stuðla møguleikum hjá børnum og ungum at verða hoyrd og hava ávirkan á viðurskifti, sum viðvíkja teimum,
- styrkja luttøku, inklusjón og javnrættindi hjá børnum og ungum við serligum tørvi,
- arbeiða fyri, at børn og ung fáa møguleika at mennast og vera virknir luttakarar í lærings- og sosialum felagsskapum,

- vísa á, hvussu barnarættindasjónarmið verða tikin við í ráðgeving

---

5. Krøv til veitara

Veitarin skal skjalprógva:

- Serligan serkunnleika innan Karlstad-leistin og tær námsfrøðiligu tilgongdir, sum verða brúktar í leistinum.
- drúgvar royndir við ráðgeving og undirvísing innan alternativan og stuðlandi samskiftisførleika.
- royndir við førleikamenning av fakfólkum innan sernámsøkið.
- hava viðkomandi hægri útbúgving innan námsfrøði, sernámsfrøði, taluvenjing, sálarfrøði ella skyld øki.
- Fyrimun hevur veitari við góðum føroyskum førleika.

Tilboðið skal innihalda:

- lýsing av fyritøkuni/stovninum/veitara
- CV hjá teimum ráðgevum, sum verða knýttir at uppgávuni
- lýsing av arbeiðshátti og metodum, íroknað hvussu ofta samband er millum veitara og netverk pr ár
- minst tríggjar viðkomandi referensur

---

6. Trú og heiður

Bjóðari skal saman við tilboðnum lata inn undirskrivaða trú- og heiðursváttan um skuld til tað almenna sambært galdandi reglum.

---

7. Hvussu verður tilboðið vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis:

• Góðska 50%

• Prísur 50%

Útrokningin fer fram á henda hátt:

Góðska: Dentur verður lagdur á hvør ráðgevi best fer at megna at loysa uppgávurnar. Vit hyggja tí eftir førleikum, útbúgving og royndum við líknandi uppgávum, men vit fara eisini

at meta um og hyggja eftir samskiftisevnum og samstarvsførleikum. Dentur verður lagdur á at útbúgving er viðkomandi fyri uppgávuloysn. Út frá eini samlaðari meting av førleikum hjá ráðgevanum verður stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Tilboðsgevari verður síðan bjóðaður til samrøðu. Eftir tað verða endalig stig givin fyri góðsku. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, t.e. hvørja meting Undirvísingarstýrið hevur av innkomna tilfarinum og samrøðuni við ráðgevan. **Prísur**: Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Undirvísingarstýrið setur eina dómsnevnd at meta um innkomnu tilboðini. Í henni sita umboð fyri leiðsluna, starvsfólk, sum arbeiða innan økið og Keyp Landsins, Gjaldstovan.

---

8. Sáttmálatíðarskeið

Sáttmálin verður galdandi í **1 ár** frá gildiskomu, við møguleika fyri at leingja 1 ár.

Undirvísingarstýrið kann velja at leingja sáttmálan sambært galdandi reglum og treytum í sáttmálanum.

---

9. Tíðarætlan

Tiltak	Dagfesting
Kunngering av útboði	13.11.2026
Freist at seta skrivligar spurningar	04.12.2026
Svar til spurningar	09.12.2026
Freist at lata inn tilboð	15.12.2026
Fráboðan um val av veitara	23.12.2026
Undirskrift av sáttmála	04.01.2026

---

10. Fyrivarni

Undirvísingarstýrið skilar sær rætt til:

- at taka ongum tilboði við,
- at biðja um nágreiningar ella nærri upplýsingar um innkomin tilboð,
- at strika ella gera broytingar í útboðnum, um saklig grund er til tað.

11. Innsending

Tilboð skulu latast inn sambært leiðbeiningunum á Keypsportalinum innan ásettu freistina.

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar.

Spurningar skulu sendast til tora@uvs.fo. Spurningar, ið eru settir fyri fríggjadagin 7. desember kl 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi mikudagin 09. desember. kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar kunnu síggjast dulnevnd á www.keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði:

Freist mánadagin 15. desember 2026 kl. 12.00

Tilboð skulu sendast til starv@uvs.fo